– Eg varð eitt skeivt keyp. Eg veit ikki, hvat teir hildu um meg, men eg eri ikki nakar verjukendur spælari

Thomas Gravesen um tíðina í Real Madrid

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

ÍTRÓTTUR

GÍ og ÍF skulu spæla nýggjan dyst

Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av, at GÍ og ÍF skulu spæla nýggjan dyst, tí ÍF hevði 12 spælarar á vøllinum eina løtu undir Formuladystinum tann 27. august. Harvið fáa bæði feløgini nýggjan møguleika at vinna trý stig, og teimum stigunum hevur ikki minst ÍF brúk fyri í botnstríðnum

FÓTBÓLTUR

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Hendingin var av teimum sjáldsomu, tá ið ÍF hevði ein spælara ov nógv á vøllin í Formuladystinum ímóti GÍ tann 27. august. Hetta var í seinna hálvleiki, og støðan var tá 1-1.

ÍF-spælarin Christian Soelberg fekk ein snudd í beini og var tikin út um vøllin til viðgerð. ÍF-bonkurin var júst tá ið holt við at gera eina útskifting, og avgjørt var í eini skjótari vending at taka tann skadda spælaran út. Tá ið skaddi spælarin so kom fyri seg aftur, fór hann aftur á vøllin, og harvið gjørdist hann 12. spælarin hjá ÍF á vøllinum.

ÍF og GÍ spældu javnleik tann 27. august, men nú fáa feløgini nýggjan møguleika at ogna sær trý stig

– Hatta var ein misskiljing millum meg og hjálpardómaran. Eg fekk ikki við, at tað var Christian Soelberg, sum varð skiftur út, og spælarin visti heldur ikki sjálvur, at hann varð skiftur út. Tá ið hann so bað um at sleppa inn á vøllin aftur, vinkaði eg hann inn, segði dómarin Dagfinn Olsen eftir dystin.

Christian Soelberg var bert lítla løtu á vøllinum, men hetta var júst um tað mundið, tá ið ÍF skoraði til 2-1. Seinni javnaði GÍ til 2-2, sum var endaliga úrslitið av dystinum.

Nýggjur dystur skal spælast

GÍ gjørdi eftir dystin av at kæra hendingina við kravi um nýggjan dyst, tí ÍF hevði spælt við 12 spælarum eina løtu.

Kappingarnevndin hjá FSF hevur viðgjørt kæruna og er komin til ta niðurstøðu, at nýggjur dystur skal spælast. Í øðrum londum eru fordømi um slíkar hendingar, og tá hevur nýggjur dystur verið ásettur.

ÍF fær ikki nakra revsing fyri at hava havt 12 spælarar á vøllinum samstundis, tí staðfest verður, at her er talan um eina óhepna miskiljing.

Kappingarnevndin hevur ásett nýggja dystin at verða spældan mikudagin í næstu viku.

Harvið fáa bæði ÍF og GÍ møguleikan at vinna sær trý stig heldur enn eitt stig, sum tey fingu burtur úr tí nú strikaða dystinum.

Heimsmeistarar undir trýsti

Italia snávaði í fyrsta dystinum í EM-undankappingini, og í kvøld hevur liðið ikki ráð at tapa dystin ímóti Fraklandi

EM

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Í kvøld verður ein ørgrynna av landsdystum spældir kring Europa. Føroyar skulu ikki á vøllin í kvøld, men tað skulu øll hini liðini í okkara EM-bólki.

Stóri dysturin verður spældur í París, har heimsmeistararnir úr Italia og varaheimsmeistararnir úr Frakland spæla eina endurtøku av HM-finaluni í summar.

Frakland hevur fingið góða byrjan í undankappingin, tí liðið vann 3-0 á útivølli ímóti Georgia leygardagin. Italia snávaði hinvegin í fyrst dystinum, tí liðið fekk bert javnleik á heimavølli ímóti Litava, sum verður roknað sum eitt av veikaru londunum í bólkinum.

Italia hevur ikki ráð at tapa dystin í kvøld, tí roknað verður við sera tættari kapping um fremstu plássini í bólkinum.

Danir til Íslands

Skotar fingu flúgvandi byrjan við stórsigrinum á Føroyum leygardagin, og Skotland skal í kvøld spæla á útivølli ímóti Litava. Megnar Skotland at vinna hendan dystin, liggja teir á odda í okkar EM-bólki eftir fyrstu umførini.

Ukraina og Georgia skulu eisini spæla í kvøld. Hetta er fyrsti dysturin hjá Ukraina í hesi undankapping, meðan Georgia hevur vunnið ein og tapt ein dyst.

Nógvir aðrir spennandi dystir eru á skránni í kvøld, og spenningurin er stórur í Íslandi, har Danmark kemur at spæla í kvøld. Ísland vann heili 3-0 á útivølli ímóti Norðurírlandi leygardagin, og har er stór optimisma undan dystinum ímóti Danmark. Danska TV3 sendir beinleiðis frá dystinum, sum byrjar klokkan 18.05 í kvøld.

EM-dystir í kvøld

Bólkur F	Ísland-Danmark	18.05
Bólkur E	Ísrael-Andorra	19.00
Bólkur B	Ukraina-Georgia	19.00
Bólkur A	Azerbaijan-Kazakhstan	19.00
Bólkur C	Noreg-Moldova	19.00
Bólkur E	Russland-Kroatia	19.00
Bólkur B	Litava-Skotland	19.30
Bólkur F	Svøríki-Liktinstein	19.30
Bólkur C	Turkaland-Malta	20.00
Bólkur A	Finnland-Portugal	20.00
Bólkur G	Albania-Rumenia	20.00
Bólkur D	Slovakia-Kekkia	20.15
Bólkur C	Bosnia-Ungarn	20.15
Bólkur F	Norðurírland-Spania	20.15
Bólkur G	Holland-Hvítarussland	20.30
Bólkur A	Pólland-Serbia	20.30
Bólkur D	San Marino-Týskland	20.45
Bólkur E	Makedonia-Ongland	21.00
Bólkur A	Armenia-Belgia	21.00
Bólkur B	Frakland-Italia	21.00

Steypadysturin er steðgaður

Kappingarnevndin hjá FSF hevur útsett steypadystin millum EB/Streym og HB, nú Ítróttardómstólurin skal viðgera kærumál frá VB/Sumba

HB-MÁLIÐ

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av, at fjórðingsfinalan millum EB/Streym og HB verður ikki spæld í kvøld sum ætlað. Orsøkin er, at Ítróttardómstólurin hjá ÍSF skal hava nýggja viðgerð av drúgva málinum um spæliloyvið hjá HB-spælaranum Páll Mohr Joensen í steypadystinum ímóti VB/Sumba tann 25. mars.

Spæliloyvið hjá Páll var ikki í HB, tá ið hann spældi dystin, og Kappingarnevndin og Dómsnevndin hjá FSF hava fleiri ferðir viðgjørt málið. Seinasti dómurin var tann, at HB skuldi ikki tapa dystin, men fáa bót og missa heimavøll í steypakappingini. Dómsnevndin helt, at umstøðurnar vóru serligar, og tí skuldi HB ikki dømast at tapa dystin, sum vanligt annars hevur verið í líknandi málum um spæliloyvi.

Ítróttardómstólurin uppí

VB/Sumba kærdi mikumorgun málið um spæliloyvið hjá Páll Mohr Joensen til Ítróttardómstólin hjá ÍSF, og Ítróttardómstólurin fer at taka kæruna frá VB/Sumba upp. Fundur er ásettur at verða í dag kl. 17.00.

Í kvøld kl. 18.00 var fjórðingsfinalan millum EB/Streym og HB annars ásett at verða spæld, men dysturin verður ikki spældur. Kappingarnevndin hjá FSF hevði fund í gjárkvøldið, og har var avgjørt at útseta dystin, meðan Ítróttardómstólurin viðger málið.

– Hetta málið hevur víst, at kæruvegurin fyri slík mál eisini umfatar Ítróttardómstólin, og tí hava vit valt at útseta dystin fyribils, sigur Høgni í Stórustovu, formaður í Kappingarnevndini hjá FSF.